Hanni Bjartalíð:

# - Fínt um eg irriteri fólk

Fyri Hanna Bjartalíð er tað at mála drímegin í at liva. Alneyðugt, meðan tað stendur uppá, men tá málningurin er liðugur, er hann ein vøra, sum kann keypast og seljast, sum so mangt annað. Góðkenningin kemur í aðru røð, og fyribils er Hanni nøgdur við at irritera fólk eitt sindur



*Tað er eitt sindur av ein oyðirmarkargongd, um teg heldur teg skula skapa tín egna stíl, tí alt er gjørt fyrr, og onki er í grundini nýtt longur, sigur Hanni Bjartalíð, listamaður*

*Mynd: Bárður Lydersen*

SAMRØÐA

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*
*Myndir: Bárður Lydersen*

Hann festir sær í enn eina sigarett og skeitir eitt sindur forherðaður at sínum málningum á vegginum aftanfyri seg. Typiskar Hanni Bjartalíð myndir, sovorði eitthvørt tvey ára gamalt kundi teknað, vildi onkur sagt

- Ja, hatta havi eg hoyrt nakrar ferðir, men børnum dáma faktiskt yvirhøvur ikki mínar myndir. Tey tíma ikki sovorðið, tey sjálvi kundu havt teknað. Sjálvandi ikki. Eg tími heldur ikki hugnaligar myndir av vøkrum fólkum og landsløgum, eg sjálvur kundi havt málað.

## Tað siðbundna órógvar

So í staðin málar Hanni menniskju við alt ov stórum høvdi, onkur manglar ein arm og onkustaðni fara fiskar svimjandi framvið í leysari luft. Naivistiskar, hevur onkur kallað myndirnar, men Hanni er bara lutvíst samdur

- Mínar myndir eru ikki naivistiskar, um man harvið meinar, at tær eru framhald av naivismuni, sum fyrst av øllum var ein uppreistur móti listarligu siðvenjuni í 1800 talinum. Barnsliga úttrykkið líkist kanska, men tað er eitt listarligt mál, eg havi valt, fyri at skapa eitt nakið, knívskorið og rátt úttrykk. Ikki fyri at mótmæla nøkrum sum so.

Listarliga heldur Hanni seg hinvegin hava nógv í felag við sonevndu Art Brut greinina. Art Brut fór heilt yvir í hina gjónna, tá tað ráddi um at dyrka tað sermerkta og einstaka, fullkomiliga leysrivið frá øllum sosialum og mentanarligum ávirkanum. "Tann ráa visiónin" verður hendan listagreinin eisini nevnd, sum setur øll normalitetshugtøk úr gildi, fyri at koma aftur til tað upprunaliga.

- Flestu av Art Brut málararnum hava verið sinnisjúkir, so í so máta kenni eg ikki nakran beinleiðis skyldskap við teir. Men hetta, at teir vendu blindað eygað til øll listarlig rák og siðvenjur hevur altíð tiltalað meg, sigur Hanni, og leggur áherðslu á, at hansara myndir ikki eru ein roynd at herma eftir barnatekningum.

- Um lítli sonur mín og eg tekna tvær akkurát líka barnsligar myndir av sama fiskitúri, merkir tað ikki, vit hava teknað somu mynd. Hann dugir ikki at tekna øðrvísi. Tað dugi eg, og tí órógva atlit til siðbundnar skuggar, ljós og neyvar smálutir mína tekning. Eg má arbeiða sera hart uppá at gera tað, sum eitt barn ger av sær sjálvum, fyri at fáa okkurt beinleiðis og nakið fram í myndina.

## - Harragud, tað er bara ein málningur

Sermerkti stílurin hjá Hanni er úrslit av 20 ára royndum og trimum árum á listaskúla í Finlandi. Hann seldi sína fyrstu mynd sum 19 ára gamal fyri eitt kartong av sigarettum, men hevur verið hugtikin av myndlist, alt hann kann minnast. Og hann var ein heilt lítil smádrongur, tá hann fyrstu ferð sjálvur fann uppá at fara á listaframsýning.

- Eg kann ikki hava verið serliga gamal, tá eg fór á fernisering hjá Hans Jacob Glerfoss á Klaksvíkar Bókasavnið. Eg ánaði ikki, hvat 'fernisering' merkti og líka lítið, hvat ein listamaður var fyri nakað. Eg minnist ikki tær einstøku myndirnar, men ógvusliga huglagið í teimum gjørdi stórt inntrykk uppá meg. Ivaleyst vóru mínar fyrstu myndir eisini ein roynd at líkjast Glerfoss.

Hanni hevur tað rættiliga avslappað við sínum fyrstu málningum, og heldur tað ikki vera pínligt at síggja teir aftur, hóast stílskiftið tykist vera rættiliga kollveltandi.